





Brúkaraumboðið

# Ársfrágreiðing

# 2023








# Innihaldsyvirlit


**Embætið hjá Brúkaraumboðnum** .... 4

**Virksemið í 2023** .... 6

**Eftirlit við góðum marknaðarføringssiði** .... 10

**Ávís útvald mál í 2023** .... 12

**Kapittul 1 Villleiðandi marknaðarføring** .... 13

- Brúkaraumboðið viðgjørt mál um internetsambandið umborð á Norrønu .... 13
- Villleiðandi lýsing á Facebook síðuni hjá Nema .... 14
- Atlantic Airways fekk ávaring og átalu .... 15

**Kapittul 2 Óumbidnar áheitanir til ávísar móttakarar** .... 17

- Kappingar á sosialum miðlum .... 17

**Kapittul 3 Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung** .... 19

- Lýsingar og vinningar, ið innihalda rúsdrekka .... 19
- Vinningurin var ein botox viðgerð .... 20

**Kapittul 4 Haldaraavtalur** .... 21

- Burn Fitness fekk átalu og ávaring .... 22

**Kapittul 5 Prísir** .... 24

- Samlaður prísur skal upplýsast .... 24
- Skelting við prísi uttan pant er ikki loyvt .... 24
- Fyritøka upplýsti einans prísir uttan mvg, hóast sølu til privatkundar .... 25
- Stakroyndir av tilboðsbløðum og heimasíðum .... 25

**Kapittul 6 Gávukort** .... 28

- Um gávukort .... 28
- Elektronisk gávukort .... 28
- Tilboðspakki við avmarkaðari gildistíð í tráð við marknaðarføringslógina .... 29

**Kapittul 7 Forhandarmeting** .... 31

- Forhandarmeting viðvíkjandi upplivingargávukortum .... 31
- Forhandarmeting um átak hjá handli við virðisseðlum .... 32
- Forhandarmeting til uppsparingskontu hjá banka .... 32

**Kapittul 8 Gjaldslóg** .... 34

- Kontantreglan ........ 34
- Brúkaraumboðið tók avgerð í máli um rættin at rinda við reiðum peningi ........ 35
- Ikki møguligt at rinda kontant fyri brennievni ........ 36

Vegleiðingar og kunning ........ 37
Frámerkja lýsingar á sosialum miðlum ........ 38
Black Friday – góð ráð ........ 41
Norðurlendskur fundur í Nuuk ........ 43
Nordic Consumer Summit í Porsgrunn í Noregi ........ 44
Jobmatch 2023 ........ 45

# Embætið hjá Brúkaraumboðnum

Brúkaraumboðið varð sett á stovn 1. januar 2009, tá lóg um marknaðarføring varð sett í gildi.

Sambært marknaðarføringslógini setir landsstýrismaðurin Brúkaraumboðið fyri eitt 5-ára tíðarskeið. Síðani 1. november 2022 hevur Rannvá Sólheim røkt starvið, sum Brúkaraumboð.

Afturat stjóranum eru tvey løgfrøðilesandi í starvi á Brúkaraumboðnum. Talan er um parttíðarstørv, sum verða røkt við síðuna av lesnaðinum.



Brúkaraumboðið er stovnur undir Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og hevur eftirlit við, at marknaðarføringslógin og partar av gjaldslógini verða hildnar.

Brúkaraumboðið er sjálvstøðugur myndugleiki og stovnur. Avgerðir Brúkaraumboðsins kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika.

Brúkaraumboðið skal av sínum eintingum, ella eftir áheitan við samráðingum, royna at ávirka vinnurekandi at virka eftir meginregluni fyri góðan marknaðarføringssið og yvirhøvur at halda lóggávuna á økinum.

Brúkaraumboðið raðfestir støðugt sítt arbeiði eftir menning og rák í samfelagnum og út frá teimum fráboðanum, ið Brúkaraumboðið fær. Á hvørjum ári verður avgjørt, hvørji øki skulu raðfestast at arbeiða við í árinum.

## Raðfestingar 2023

Eitt økið, sum serligur dentur hevur verið lagdur á í 2023, er sokallaða spammforboðið í marknaðarføringslógini, sum fevnir um óumbidnar áheitanir til ávísar móttakarar.
Flestu málini hava snúð seg um kappingar á sosialum miðlum, har eitt av krøvunum hevur verið, at brúkarin skal frámerkja/tagga ein ella fleiri vinir fyri at luttaka. Hetta er brot á § 6 í marknaðarføringslógini.

Eitt annað økið, sum eisini hevur verið raðfest, er eftirlitið við prísmarknaðarføringini hjá teimum vinnurekandi. Á heystið 2023 gjørdi Brúkaraumboðið fleiri stakroyndir av tilvildarliga útvaldum vørum í tilboðsbløðum og á heimasíðum hjá veitarum av gerandisvørum, klædnavørum og vælveruvørum á føroyska marknaðinum. Í summum føri var fyritøkan

tilvildarliga útvald, og í øðrum føri hevði Brúkaraumboðið fingið fráboðan um, at prísirnir hjá fyritøkuni ikki vóru rættir.

Brúkaraumboðið bað fyritøkurnar um at skjalprógva príslækkingina við at upplýsa upprunaprís á tilboðsvøruni, soleiðis at staðfestast kundi, um talan var um verulig tilboð. Stakroyndirnar vístu, at ymiskt var, hvussu fyritøkurnar megnaðu at skjalprógva upprunaprísin. Í onkrum føri, lýsti handilin við tilboðsvøru, hóast vøran ongantíð hevði verið til sølu fyri upplýsta upprunaprísin, og í øðrum føri, var sama vøra upp á tilboð alt árið.

Ein av uppgávunum hjá Brúkaraumboðnum er at gera vegleiðingar, soleiðis at bæði vinnurekandi og borgarar hava betri møguleika at kunna seg um reglurnar. Eisini er uppgávan, at kunna almenningin um mál, sum eru viðgjørd av Brúkaraumboðnum, og sum hava almennan týdning ella áhuga. Fyri at gera tað lættari, at fáa kunning frá Brúkaraumboðnum, ber nú til, at melda seg til tíðindabræv á heimasíðuni. Harafturat verður arbeitt við at betra um heimasíðuna, men tað arbeiðið er ikki liðugt enn.

## Brúkaravernd

Í 2023 fór Brúkaraumboðið undir at skráseta fyrispurningar, sum koma umvegis telefon. Heili 147 fyrispurningar eru skrásettir. Spurningarnir fevna sera breitt. Ein partur snýr seg sjálvsagt um økið hjá Brúkaraumboðnum, men ein stórur partur av fyrispurningunum snýr seg um ábrek (manglar) við vøru og um umvælingar, sum taka alt ov langa tíð. Brúkaraumboðið hevur ikki heimild at taka hesi málini upp og viðgera tey, men vit hava valt at ráðgeva borgarum við at upplýsa um lóggávuna á økinum, soleiðis at borgarin kann meta um sína rættarstøðu.

Hesir borgarar eru ofta í eini truplari støðu, tí at tað er eingin myndugleiki ella kærunevnd, sum kann taka avgerð í málinum. Eftir verandi skipan kann ein brúkari, ið er komin illa fyri av einum keypi, bert fara umvegis dómstólarnar, og kann hetta gerast drúgt og kostnaðarmikið fyri brúkaran. Tí mælir Brúkaraumboðið til, at sett verður á stovn ein brúkarakærunevnd, sum skal viðgera kærur frá brúkarum um keyp av vørum og tænastum.

Ein brúkarakærunevnd kundi verið mannað við umboðum fyri brúkarar og vinnurekandi. Eftir nærri ásettum reglum kundi ein brúkarakærunevnd viðgjørt kærur um keyp og sølu og tikið avgerð í málum. Hetta vildi bøtt um verndina hjá brúkarum og verið ein skjót og smidlig skipan, sum hevði hjálpt bæði vinnurekandi og brúkarum.

Tórshavn, tann 21. mars 2024

Brúkaraumboðið
Rannvá Sólheim

# Virksemið í 2023

Í 2023 vórðu skrásett 194 mál.

Av hesum vóru 73 kærur/eftirlitsmál, 100 fyrispurningar/ fráboðanir/forhandarmetingar og 21 mál av øðrum slag.



## Brúkaraumboðið vitjar vinnuna

Brúkaraumboðið hevur havt fund við Vinnuhúsið og einstøkar fyritøkur í 2023. Í tráð við samráðingarmeginregluna í marknaðarføringslógini, er partur av arbeiðinum hjá Brúkaraumboðnum at kunna og at samráðast við vinnuna.

Brúkaraumboðið hevur m.a. kunnað um yvirskipaða endamálið við marknaðarføringslógini, um viðkomandi ásetingar, og um møguleikan fyri forhandarmeting.
Fyritøkur hava í hesum sambandi eisini havt møguleika at seta spurningar um marknaðarføring og um arbeiðsøkið hjá Brúkaraumboðnum.

Brúkaraumboðið hevur eisini verið á vitjan á Glasi og hevur havt framløgu fyri næmingum á búskaparbreytini. Framløgan endaði við eini Kahoot-kapping og kundi Brúkaraumboðið staðfesta, at næmingarnir høvdu fingið nógv burturúr.




## Spurningar umvegis telefon

Í 2023 fór Brúkaraumboðið undir at skráseta spurningar umvegis telefon.
Inn komu 147 spurningar umvegis telefon. Spurningarnir hava snúð seg um ymiskt, og hevur Brúkaraumboðið tikið onkrar av teimum upp sum mál. Fleiri spurningar hava eisini verið um manglar við keypi og um umvælingar á keypta vøru. Brúkaraumboðið hevur ikki heimild til at fara inn í hesi mál, men hevur vegleitt sambært keypilógini. Niðanfyri verða umrøtt nøkur av evnunum, sum Brúkaraumboðið hevur vegleitt um umvegis telefon í 2023.

## Iðranarrættur og afturberingarrættur

Keyp er bindandi avtala, og tú kanst í grundini ikki iðra teg um keypið. Hóast fleiri handlar geva tær rætt til at bera aftur ella býta um, er tað ikki ein rættur tú hevur sambært lóg.

Seljarin ger sjálvur av, um hann gevur iðranarrætt, og hvørjar reglur, ið skulu galda í sambandi við iðranarrættin. Tað, ið galdandi er fyri iðranarrætt, skal verða avtalað, tá ið keypt varð.

## Er vøran ikki í lagi?

Vøran nýtist ikki at vera brotin fyri at hava eitt ábrek. Sum tað sæst niðanfyri, kann ábrek við tí keypta vera nógv ymiskt. Orðið “ábrek” ella “mangul” sum tað ofta verður sagt, skal skiljast breitt. Sambært keypilógini er ikki altíð talan um ábrek, um okkurt er galið við tí keyptu vøruni. Talan er bert um ábrek, um hetta ella orsøkin til hetta, er til staðar, tá tú fært vøruna. Ábrekið kann gott hava verið til staðar, tá tú keypti vøruna, hóast hetta ikki vísir seg fyrr enn seinni. Dømi um ábrek (manglar) sambært keypilógini kunnu nevnast:

- Nýggja telefonin sløknar, uttan at tú tilvitað hevur sløkt hana ella at hon manglar at løðast.
- Vøran samsvarar ikki við heitið, hon er seld undir. Sofan er seld sum leðursofa, men tað vísir seg, at tað bara eru púturnar, sum eru leður, restin er leðurlíki.
- Vøran hóskar seg ikki til endamálið, hóast seljarin hevur váttað, at hon er hóskandi. Seljarin, ið veit hvat slag av teldu tú eigur, viðmælir ein ávísan printara, ið ikki er sambærur við tína gomlu teldu.
- Vøran hevur ikki ta haldgóðsku, ið tú eigur at kunna krevja. Tín nýggja vaskimaskina brotnar aftaná 10 mánaðir, orsakað av einum feili í motorinum.
- Eitt sølulið longri frammi í ketuni, t.d. innflytari ella framleiðari, hevur í lýsingum ella á innpakking givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar um vøruna, t.d. at bilurin hevur sóltak.

## Umvælingar

Sambært keypilógini er ein tvey ára freist at fráboða seljara, at okkurt er galið við vøruni. Er freistin runnin, skalt tú sjálv/ur rinda fyri umvælingina. Hetta er eisini galdandi, hóast freistin ikki er runnin, men ábrekið ikki er umfatað av keypilógini, t.d. um tú sjálv/ur kann ábyrgdast fyri ábrekið.

Er støðan tann, at umvælingin er illa gjørd, tekur sera langa tíð ella hevur ført við sær nýggjar skaðar og vøran ikki riggar, sum hon skal aftaná umvælingina, kanst tú klaga til umvælaran. Umvælarin skal hava møguleika til at fáa arbeiðið í rættlag.

Tú kanst ikki beinanvegin krevja at fáa pengarnar aftur, um tú ikki er nøgd/ur við umvælingina. Er ábrekið afturvendandi og umvælarin ikki kann umvæla ábrekið, er útgangsstøðið, at tú kanst krevja at fáa pengarnar fyri vøruna aftur. Er talan tó um

eitt ábrek, ið bert er av og á, kann tað vera trupult at staðfesta ábrekið, og tí kann gerast neyðugt við fleiri royndum at umvæla.

## Umvælingar, tú skal gjalda fyri

Útgangsstøðið er, at ein avtala er bindandi millum partarnar. Hetta merkir, at umvælarin ikki kann krevja eitt hægri gjald, um hann er farin skeivur av prísinum, ella um arbeiðið lekur longri tíð enn væntað. Er talan um trupulleikar, ið umvælarin ikki hevði møguleika at síggja frammanundan, kanst tú tó ikki krevja, at umvælingin verður gjørd fyri tann avtalaða prísin.

Verður umvælarin varugur við, at umvælingin ikki kann gerast fyri tann avtalaða prísin, skal hann steðga umvælingini og seta seg í samband við teg, og tú kanst avgera, um umvælingin skal gerast ella ikki.

## Umvælingar, ið taka langa tíð

Hóast tú og umvælarin hava avtalað, at umvælingin skal verða liðug ein ávísan dag, er meginreglan, at tú mást góðtaka, at arbeiðið verður seinkað. Hetta er serliga galdandi, um tað er torført at fáa eykalutir, um vøran ella ábrekið er sera fløkt ella um talan er um eitt ábrek, ið bert er av og á.

Um tað eftir fleiri royndir ikki ber til at umvæla ella umvælingin tekur órímiliga langa tíð, kann ivamál vera um ella hvussu nógv tú skalt gjalda fyri umvælingina. Tú kanst geva umvælaranum eina freist at gera arbeiðið liðugt. Tá freistin er runnin, kanst tú krevja at fáa vøruna.

Um tað er rímiligt og tú hevur rætt til at krevja, at umvælingin verður steðgað, kann umvælarin bert krevja, at goldið verður fyri ein part av gjørda arbeiðinum, t.d. fyri nýggjar eykalutir. Um tú av órøttum steðgar arbeiðinum er útgangsstøðið, at tú skal gjalda tann avtalaða prísin fyri umvælingina.

## Nýggj ábrek

Støðan kann vera tann, at eitt ábrek vísir seg eftir eina umvæling, og tí hevur tann fyrsta umvælingin einki virði. Í einari tílíkari støðu kanst tú bert nokta at gjalda fyri umvælingina, um tann fyrsta umvælingin er orsøkin til tey nýggju ábrekini.

# Eftirlit við góðum marknaðarføringssiði

Brúkaraumboðið varðar av og hevur eftirlit við, at lóg um marknaðarføring verður hildin. Marknaðarføringslógin skapar karmar og spælireglur fyri marknaðarføring í Føroyum, sum eru so mikið víðar, at tey sum marknaðarføra vørur og tænastur, skulu kenna, at til ber at vera skapandi og at menna nýggjar marknaðarføringshættir.

Marknaðarføringslógin skal eisini virka fyri at skapa góðar normar á marknaðinum, og áleggur teimum, ið eru fevnd av lógini, at sýna góðan marknaðarføringssið við atliti til brúkaran, vinnurekandi og almenn samfelagsáhugamál. Hetta er ein heildartreyt, ið er ásett í § 1 í lóg um marknaðarføring.

Ætlanin við heildartreytini um at sýna góðan marknaðarføringssið er, at ásetingin kann nýtast ímóti øllum sløgum av órímiligum sølu og lýsingatiltøkum, ímóti eftirgerð og aðrari misnýtslu av avriki hjá vinnurekandi, ímóti órímiligum avtalutreytum, og til tess at verja persónligt sjálvræði umframt heimafrið.

Niðarfyri er eitt útvalt mál, sum Brúkaraumboðið tók avgerð um í 2023 um góðan marknaðarføringssið.

**Gjald fyri at standa á bíðilista hjá Bústøðum**

Brúkaraumboðið fekk eina fráboðan um, at árliga umsitingargjaldið til Bústaðir bert kann gjaldast við girokorti, sum verður sent við vanligum posti. Borgarin gjørdi vart við, at um girokortið ikki verður goldið rættstundis, verður mann strikaður av bíðilistanum uttan ávaring. Borgarin meinti, at hetta var sera vánalig viðferð av limunum.

Borgarin vísti á, at nógv av teimum, sum standa á bíðilistanum hjá Bústøðum, eru fólk, sum búgva til leigu, og at hesi javnan flyta bústað. Tá er vansin, at girokortið verður sent til gamla bústaðin, og so verður girokortið ikki goldið. Endin av hesum er, at fólkini verða koyrd av listanum, og mugu byrja av nýggjum.

Brúkaraumboðið valdi at kanna málið í mun til avtalutreytir og góðan marknaðarføringssið, sbrt. § 1 í marknaðarføringslógini.

Bústaðir hevur greitt frá, at tað er ikki rætt, at man verður strikaður av listanum uttan ávaring, tí limirnir fáa ein rykkjara sendandi um girokortið ikki er goldið rættstundis. Eisini helt felagið, at tey gera eitt stórt arbeiði fyri at kunna fólk á bíðilistanum um, at tað er soleiðis mannagongdin er. Rokning og rykkjari fara til tær adressurnar, sum fólk hava upplýst

felagnum, og koma hesi brøv aftur til Bústaðir frá Posta, við boðum um, at adressan er skeiv, so verður roynt á annan hátt at finna viðkomandi, t.d. umvegis telefon ella teldupost. Eisini gongur rúm tíð, áðrenn limurin verður strikaður av bíðilistanum.

Víst verður eisini á, at tað er ikki neyðugt at rinda árliga umsitingargjaldið við girokorti, tí til ber eisini at melda seg til sjálvvirkandi gjaldsskipan.

Felagið upplýsir eisini, at arbeitt verður við, at Bústaðir skulu hava eina sjálvgreiðslu umvegis Vangan, men hetta er ikki klárt enn.

**Niðurstøða**

Brúkaraumboðið metir, sum útgangsstøði, at treytirnar fyri at rinda umsitingargjaldið eru nøktandi, sbrt. § 1 í marknaðarføringslógini. Tó skal vísast á, at Bústaðir hevur upplýst, at tað er møguligt at flyta árliga umsitingargjaldið við sjálvvirkandi gjaldsskipan. Brúkaraumboðið metir ikki, at hetta framgongur nóg greitt av treytunum, og mælir til, at upplýsa betri um henda møguleika.

Bústaðir hevur tikið niðurstøðuna til eftirtektar og fer at upplýsa betri um møguleikan fyri at flyta árliga umsitingargjaldið við sjálvvirkandi gjaldsskipan











# Ávís útvald mál í

# 2023





Brúkaraumboðið

# Kapittul 1

## Villleiðandi marknaðarføring

Sambært § 3 í lóg um marknaðarføring er ikki loyvt at nýta villleiðandi og óhóskandi marknaðarføring. Ásetingin er í høvuðsheitum ætlað at verða brúkt um tað, sum vinnurekandi siga um teirra egnu vørur og tænastur, herundir um prís og eginleikar, í førum har hetta gevur móttakaranum eina skeiva fatan av vørunum ella tænastunum. Ætlanin er at tryggja, at skeivar, villleiðandi, niðrandi ella órímiliga ófullfíggjaðar upplýsingar ikki verða nýttar í marknaðarføring. Endamálið er at verja onnur vinnurekandi og brúkarar ímóti upplýsingum og framferðarhættum, sum eru óhóskandi. Ásetingin er avmarkað til at umfata gerðir, sum kunnu ávirka útboð og eftirspurning. Harumframt er krav um, at tað skal kunna skjalprógvast, at upplýsingar, sum verða latnar um verulig viðurskifti, eru rættar.
Brúkaraumboðið hevur viðgjørt nøkur mál um villleiðandi marknaðarføring, og eru trý mál umrødd niðanfyri.

### Brúkaraumboðið viðgjørt mál um internetsambandið umborð á Norrønu

Ein borgari gjørdi vart við, at internetsambandið umborð á Norrønu als ikki var so gott sum lýst varð við. Borgarin vísti á, at tað í lýsingini stóð, at til bar at stroyma, men sannleikin var ein heilt annar. Borgarin vísti á, at tað bar slettis ikki til, at hyggja eftir einum fótbóltsdysti umvegis internetið umborð á Norrønu, og at lýsingin tí ikki samsvaraði við veruleikan. Borgarin hevði eisini hoyrt, at um manningin stroymdi t.d. ein fótbóltsdyst, so “stjólu” tey alt netið frá ferðafólkunum. Brúkaraumboðið tók málið upp, og bað Smyril Line um eina frágreiðing. Smyril Line greiddi frá, at manningin hevur sítt egna net, og at tað tískil ikki er rætt, tá sagt verður, at manningin “stjelur” netið frá ferðafólkunum

Smyril Line vísti á, at tað er tekniskt avbjóðandi og sera kostnaðarmikið, at bjóða internet á sjónum. Felagið vísti á, at í lýsingini verður fyrivarni eisini tikið fyri, at internetsamband á opnum havi hevur sínar avmarkingar.

Skipið fær á leið 25 mbps umvegis tvær VSAT-antennur, og í summarsiglingini verður kapasiteturin øktur nakað. Við hesum kapasiteti kunnu umleið 35 brúkarar stroyma í senn, í summarsiglingini nakað meira.

Viðvíkjandi góðskuni greiddi Smyril Line frá, at tað kunnu verða avbjóðingar við at stroyma í 4K ella HD góðsku, tí hetta krevur so nógvan kapasitet. Hinvegin ber til at stroyma við góðskuni 360p, sum gevur eina fína mynd á fartelefon ella teldli.

Út frá hagtølunum um, hvussu nógv hald eru virkin í senn og hvussu nógv av teimum stroyma, metir Smyril Line, at felagið klárar at veita tænastu til uml. 150-200 hald í senn.

Brúkaraumboðið metti, at Smyril Line í stóran mun hevur gjørt hvat tey kundu fyri at upplýsa um, at tað eru avbjóðingar við internetsambandi á opnum havi. Út frá upplýsingum um kapasitet og hvussu nógv hald kunnu verða virkin í senn, metti Brúkaraumboðið, at Smyril Line sum útgangsstøði, hevði ein nøktandi kapasitet umborð.

Brúkaraumboðið bað Smyril Line um áhaldandi at eftirmeta, um felagið hevur nóg mikið av kapasiteti í mun til søluna av internethaldum umborð, tí tað er týdningarmikið, at ferðafólk ikki verða villleidd til at keypa eina vøru, sum tey ikki fáa.

Brúkaraumboðið mælti Smyril Line til at upplýsa, at tøki kapasiteturin verður deildur javnt millum tær eindir, sum til eina og hvørja tíð eru virknar, og at tað tískil kunnu verða avbjóðingar um stroymt verður í 4K ella HD góðsku, sum krevur sera nógvan kapasitet.

Smyril Line tók niðurstøðuna til eftirtektar, og boðaði frá, at arbeitt verður framhaldandi við at betra um góðskuna og kapasitetin umborð.

## Villleiðandi lýsing á Facebook síðuni hjá Nema

Brúkaraumboðið fekk eina fráboðan frá einum borgara um eina lýsing á Facebookvanganum hjá Nema. Í lýsingini stóð, at sparast kundi upp til 2.300 kr. Borgarin metti, at talan var um villleiðandi marknaðarføring, tí tá farið varð inn á viðheftu leinkjuna, var eingin sparing áljóðandi 2.300 kr. at síggja. Borgarin spurdi tí, hvar hann kundi spara 2.300 kr.?

Nema greiddi frá, at talan var um eina vøru, (Samsung Galaxy Z Flip 3 fartelefon), har kundin spardi 2.300 kr. Tað vóru 3 stk. á goymslu av hesi telefon, og bleiv vøran seld beinanvegin. Tískil var vøran ikki at síggja á nethandlinum meira.

Brúkaraumboðið heitti á Nema, um at vísa sjónliga á síðuni við niðursettum vørum, at vøran var útseld. Eisini vísti Brúkaraumboðið á, at tá talan er um tilboð við avmarkaðari nøgd, skal hetta upplýsast.

Brúkaraumboðið metti eisini, at lýsingarteksturin var villleiðandi, tí at teksturin legði upp til, at sparast kundi upp til 2.300 kr. við at keypa eina Apple fartelefon ella Apple farteldu. Men hetta var ikki rætt. Tað mesta, sum kundin spardi við at keypa eina Apple fartelefon var 1.602 kr. og tað mesta, kundin spardi

við at keypa eina Apple farteldu var 1.000 kr.

Samsung-telefonin, har sparingin var 2.300 kr., var hinvegin ikki nevnd í lýsingartekstinum.

Nema strikaði lýsingina, og Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.

## Atlantic Airways fekk ávaring og átalu

Brúkaraumboðið metti, at søluátakið hjá Atlantic Airways var brot á lógina um marknaðarføring. Talan var um villleiðandi søluátak, tí brúkarin ikki fekk greitt upplýst, hvussu ”Sveimandi tilboð” var sett saman.

**Málsgongdin**
Um ársskiftið 2022/2023 hevði Atlantic Airways eitt søluátak, nevnt “Sveimandi tilboð”. Í søluátakinum vóru einvegis ferðaseðlar settir til sølu úr 695 kr. á úrvaldum fráferðum á farleiðunum, Keypmannahavn, Aalborg, Billund, Oslo, Keflavík og Edinburgh, og á farleiðini til París úr 795 kr. Viðmerkt var við smáum bókstavum, at prísurin broyttist í mun til flogvallarskattir og avgjøld á valda ferðamálinum.

Brúkaraumboðið valdi at taka málið upp fyri at kanna um brot var framt á marknaðarføringslógina.

Atlantic Airways upplýsti, at prísurin broyttist í mun til flogvallarskattir og avgjøld á valda ferðamálinum.
Brúkaraumboðið helt, at hetta var trupult hjá brúkaranum at skilja, tí sambært marknaðarføringslógini eigur brúkarin greitt at síggja á einum søluátaki, hvat samlaði prísurin er fyri vøruna ella tænastuna.

Í hesum føri upplýsti Atlantic Airways, at flogvallarskatturin í Føroyum er hægri enn á øllum flogvøllum, ið vóru við í søluátakinum, uttan úr París og Edinburgh, so kundin kundi ikki keypa ferðaseðil fyri átaksprísin 695 kr., tá ferðast varð úr Føroyum til aðrar býir enn París og Edinburgh. Heldur ikki heim úr París og Edinburgh, fekk kundin átaksprísin.
Tað vil siga, at í hesum søluátakinum var bert møguligt at keypa fyri lægsta søluprís, antin úr Føroyum ella á veg til Føroyar. Í ongum føri, var lægsti sóluprísur galdandi bæði úr Føroyum og heim til Føroyar aftur. Fyri tað mesta, var lægsti søluprísur bert galdandi fyri ferðaseðlar til Føroyar, og ikki úr Føroyum.

Í marknaðarføringini av søluátakinum var m.a. lýst soleiðis:
“Ferðast til/úr Keypmannahavn, Billund, Aalborg, Oslo, Keflavík, Edinburgh ella París einvegis úr einans 695kr./795kr.”
Her varð lýst við, at lægsti átaksprísur var galdandi báðar vegir, hóast hetta ikki var rætt.

Og í aðrari lýsing: “Sveimandi tilboð til Keypmannahavn, Billund, Aalborg, Oslo, Keflavík, Edinburgh ella París einvegis úr einans 695kr./795kr.”
Her varð lýst við, at lægsti átaksprísur var galdandi úr Føroyum til øll ferðamálini. Hetta var ikki rætt, tí at lægsti átaksprísur úr Føroyum var bert galdandi fyri ferðamálini Edinburgh og París.

Brúkaraumboðið metti, at lýsingarátakið greitt vísti og gav brúkarunum ta fatan, at tilboðið var galdandi bæði úr Føroyum og heim aftur til Føroya.

Brúkaraumboðið fekk fráboðan um, at hóast leitað var eftir ferðaseðlum alt fyri eitt, tá tilboðið kom út, so var eingin ferðaseðil til ávíst ferðamál funnin fyri 695 kr. Viðkomandi ivaðist tískil í, um Atlantic Airways í heila tikið bjóðaði ferðaseðlar fyri lægsta prísin til øll ferðamálini.

**Viðgerð og niðurstøða**
Brúkaraumboðið kannaði málið og metti, at brot var framt á § 1 um góðan marknaðarføringssið, og at brot var framt á § 3 og § 9, stk. 1 í sambandi við villleiðandi og ógreiða marknaðarføring.

Eisini vísti Brúkaraumboðið á, at sølufremjandi tiltøk skulu marknaðarførast soleiðis, at tilboðstreytirnar eru týðiligar og greiðar fyri brúkaran og soleiðis, at brúkarin lættliga kann kunna seg um treytirnar. Brúkaraumboðið metti ikki, at marknaðarføringin hjá Atlantic Airways av hesum átaki, vísti týðiligt og greitt, at lægsti søluprísur bert var galdandi annan vegin, antin úr Føroyum ella til Føroyar.

Sambært marknaðarføringslógini, skal samlaði prísurin týðiliga upplýsast, íroknað avgjøld. Tað er sostatt líkamikið, hvussu høgur flogvallarskatturin er á teim ymsu flogvøllunum, tí tað er tann samlaði kostnaðurin fyri ferðaseðilin, sum skal upplýsast.

Brot á marknaðarføringslógina kann revsast við bót. Av tí at talan er um fyrsta mál av slíkum slagi hjá Atlantic Airways, gav Brúkaraumboðið felagnum eina átalu og eina ávaring fyri brot á marknaðarføringslógina í sambandi við søluátakið “Sveimandi tilboð”.

Brúkaraumboðið heitti á Atlantic Airways um at tryggja, at marknaðarføringslógin verður hildin í framtíðini. Atlantic Airways boðaði frá, at felagið longu hevði broytt leistin fyri lýsingarátøk, soleiðis at sleppast kundi undan misskiljingum.

# Kapittul 2

## Óumbidnar áheitanir til ávísar móttakarar

### Kappingar á sosialum miðlum

Eitt øki, Brúkaraumboðið hevur lagt serligan dent á í 2023, er § 6 í marknaðarføringslógini um óumbidnar áheitanir til ávísar móttakarar (spammforboðið). Brúkaraumboðið hevur í 2023 viðgjørt 52 mál um brot á § 6. Ásett er í § 6 í marknaðarføringslógini, at:

*Tað er ikki loyvt í vinnuvirksemi at senda út lýsingar, ella á annan hátt at marknaðarføra, við elektroniskum samskifti so sum telduposti, sms, mms ella líknandi, sjálvvirkandi uppkallingarskipan, telefaxi ella telefon, uttan so, at móttakarin frammanundan hevur biðið um hetta.*

Flestu málini snúgva seg um kappingar á sosialum miðlum, har eitt av krøvunum fyri at luttaka í kappingini er, at brúkarin skal frámerkja/tagga ein ella fleiri vinir. Eitt frámerki er eitt leinki millum ein brúkaravanga og tað uppslagið, sum frámerkið verður gjørt til. Tá ein brúkari verður frámerktur, fær hann vanliga eina fráboðan, sum leiðir hann inn á tað ítøkiliga uppslagið. Eitt frámerki kann metast javnt við at senda eitt leinki til ein brúkara. Um ein fyritøka t.d. frámerkir ein brúkara í einum uppslagi, sum er vinnuligt virksemi og hevur í sær marknaðarføring, er frámerkingin fevnd av spammforboðnum. Hetta er eisini galdandi, tá fyritøkan heitir á aðrar brúkarar um at frámerkja vinir sum krav fyri luttøku í kapping.

**Brot á Spammforboðið – trý útvald mál**

Í fyrsta málinum setti Brúkaraumboðið seg í samband við fyritøku, sum skipaði fyri summartiltaki, og í tí sambandi hevði kapping á teirra Facebookvanga. Fyri at luttaka í kappingini skuldi mann frámerkja tríggjar vinir, og so kundu øll fýra vinna kr. 1.000 til at brúka á sjálvum tiltakinum. Brúkaraumboðið vísti á forboðið ímóti óumbidnum áheitanum í § 6, og at fyritøkan ikki kundi krevja av brúkarum, at tey skuldu frámerkja onnur fyri at kunna luttaka í kappingini.

Fyritøkan spurdi, hvussu tey so kundu gera kappingina, soleiðis at kappingin kundi halda fram. Brúkaraumboðið vísti á, at til bar at hava eina kapping, har fýra vinnarar vórðu. Treytirnar fyri luttøku kundu t.d. verða, at mann kundi dáma

og/ella deila uppslagið ella mann kundi viðmerkja t.d. nær ella hvar tiltakið var. Men viðmerkingarnar mugu ikki leggja upp til at fólk frámerkja onnur fyri at luttaka.

Í seinna málinum var talan um fyritøku, sum í sambandi við kapping á sínum Facebook vanga, bað sínar fylgjarar dáma síðuna, deila uppslagið og frámerkja heili 10 vinir. Brúkaraumboðið gjørdi fyritøkuna varuga við, at kappingin var í stríð við spammforboðið í marknaðarføringslógini. Brúkaraumboðið vísti á vegleiðing um sosialar miðlar og spammforboðið, og á yvirlit yvir reglurnar fyri kappingar á sosialum miðlum, sum eru at finna á heimasíðuni hjá Brúkaraumboðnum.

Fyrra fyritøkan broytti kappingina, soleiðis at tað ikki longur var krav fyri luttøku at frámerkja vinir. Seinna fyritøkan strikaði kappingina alt fyri eitt, og fann vinnarnar millum tey, sum høvdu luttikið.

Í triðja málinum varð Brúkaraumboðið gjørd varug við jólakalendarakapping á Facebookvanganum hjá fyritøku, ið m.a. selir búnyti. Eitt av krøvunum fyri at luttaka í kappingini var, at mann skuldi frámerkja ein vin. Brúkarumboðið greiddi frá, at kravið um frámerking var í stríð við spammforboðið og bað fyritøkuna antin broyta kappingina, so tað ikki longur var krav fyri luttøku at frámerkja ein vin, ella steðga kappingini alt fyri eitt, og trekkja ein vinnara millum tey, sum høvdu luttikið. Fyritøkan broytti kappingina alt fyri eitt, og Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.

**Reglurnar á sosialum miðlum**

Brúkaraumboðið umsitur og hevur eftirlit við marknaðarføringslógini. Reglurnar hjá Brúkaraumboðnum um kappingar á sosialum miðlum hava tískil heimild í marknaðarføringslógini.

Brúkaraumboðið skal kortini vísa á, at tá talan er um sosialar miðlar, kunnu hesir hava egnar reglur, sum eru millum miðilin og brúkaran. Reglurnar hjá sosialum miðlum kunnu vera ymiskar frá einum sosialum miðli til annan, og kunnu broytast eftir tørvi. Skilagott er tí hjá brúkarum, at kunna seg um reglurnar hjá tí sosiala miðlinum eisini.

# Kapittul 3

## Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung

Sambært § 8, stk. 1 í marknaðarføringslógini er týðuliga ásett, at fyritøkur skulu vísa atlit, tá tær marknaðarføra mótvegis børnum og ungum. Børn og ung eru løtt at ávirka og vanta royndir og evni til at meta um ymisk viðurskifti. Ung og serliga minni børn megna ikki ella hava tað trupult við at gjøgnumskoða og meta um kunning.

Sambært § 8, stk. 2. í marknaðarføringslógini, má marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til harðskap, rúsevnisnýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð. Tað framgongur eisini av ásetingini, at marknaðarføring, ið vendir sær til henda bólk, ikki á ósømiligan hátt má brúka harðskap, ótta ella pátrúgv sum ávirkanaðarambоð.

Tá ein fyritøka hevur børn og ung sum málbólk, má hon taka atlit til henda bólk av ungum brúkarum ella kundum, og átaka sær sína etisku ábyrgd. Í lógini er lagt upp til, at fyritøkurnar eru tilvitaðar um hesa ábyrgd, ið við fyrimuni kann handfarast umvegis egnar etiskar reglugerðir.

## Lýsingar og vinningar, ið innihalda rúsdrekka

Brúkaraumboðið viðgjørdi m.a. tvey mál, har vinnurekandi lýstu við rúsdrekka á sosialu miðlunum. Tað fyrra málið fevndi um eina fyritøku, ið lýsti við teirra nýggjastu cider á Facebook og á Instagram. Ein kapping var knýtt at hesi lýsing, har til bar at vinna tvær rammur av hesum nýggja slagi. Einki aldursmark varð sett á kappingina, og tí kundi ein og hvør, sum hevði ein Facebook ella Instagram vanga vinna.

Tað seinna málið snúði seg um eina fyritøku, ið hevði ein lýsingarfilm á Facebook, har víst varð á eina øl, sum fór at verða til keyps í nýggjum búna í 33 cl. Her varð heldur ikki sett eitt aldurmark á hesa lýsing.

Brúkaraumboðið setti seg í samband við báðar fyritøkurnar og greiddi frá um regluna í § 8 í marknaðarføringslógini. Víst var á, at hóast at fyritøkan ikki metti seg hava “børn og ung” sum málbólk, so skal orðingin í lógini skiljast breitt. Orðingin í marknaðarføringslógini “børn og ung” verður tulkað sum børn og ung undir 18 ár. Aldursmarkið fyri at hava ein vanga á Facebook ella Instagram er 13 ár, og tískil metti Brúkaraumboðið, at málið eisini fevndi um aldursbólkin 13-17 ár.

Tann fyrra fyritøkan broytti kappingina, so tað sást greitt, at tað var 18 ára aldursmark fyri at luttaka í kappingini.

Tann seinna fyritøkan boðaði Brúkaraumboðnum frá, at hóast tey ikki høvdu sett aldursfiltur á sjálva lýsingina, so høvdu tey eitt aldursfiltur á teirra Facebook síðu. Tískil varð lýsingin ikki víst á vangum hjá brúkarum undir 18 ár.

*GG! Brúkaraumboðið skal vísa á, at Rúsdrekkalógin er broytt eftir at hesi málini eru viðgjørd. Broytingin kom í gildi 27. oktober 2023. Nýggja ásetingin í § 11, hevur við sær forboð ímóti at lýsa við sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka í miðlum, undir hesum eisini talgildum miðlum og øðrum miðlum, sum venda sær til eina skara í Føroyum.*

## Vinningurin var ein botox viðgerð

Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøku, sum hevði kapping á Facebook og Instagram, har vinningurin var ein botox viðgerð. Ein skal vera 18 ár fyri at kunnu fáa slíka kosmetiska viðgerð, og tí eigur aldursmark at vera ásett fyri at luttaka í kappingini.
§ 8, stk. 2 í marknaðarføringslógini ásetir, at “*Marknaðarføring, sum vendir sær til børn og ung, má ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eggja til harðskap, rúsevnisnýtslu, herundir alkoholnýtslu, ella til aðra vandamikla ella fyrilitaleysa atferð, ella á annan ósømiligan hátt brúka harðskap, ræðslu ella pátrúgv*”.

Orðingin “børn og ung” í § 8 í marknaðarføringslógini verður tulkað sum børn og ung undir 18 ár. Aldursmarkið fyri at hava ein Facebook og Instagram vanga er 13 ár, og fevndi hetta málið tískil um aldursbólkin 13-17 ár. Hóast kappingin vendi sær til ein breiðan skara, og ikki serliga til børn og ung í aldrinum 13-17 ár, so metti Brúkaraumboðið, at kappingin vendi sær eisini til børn og ung millum 13-17 ár, sum hava Facebook og Instagram, og sum fylgja hesi fyritøku.

Brúkaraumboðið gjørdi tí greitt, at tað er 18 ára aldursmark fyri at fáa kosmetiska viðgerð, og tí eigur tað ikki at vera møguligt, at børn og ung undir 18 ár kunnu luttaka og vinna botox viðgerðir. Brúkaraumboðið bað fyritøkuna upplýsa klárt og týðiligt fyri borgaranum, at kappingin bert er galdandi fyri tey sum eru 18 ár og eldri.

Fyritøkan broytti lýsingina alt fyri eitt, og Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.

# Kapittul 4

## Haldaraavtalur

Vinnurekandi nýta ofta fastar avtalutreytir, tá avtalur verða gjørdar við brúkarar. Tann vinnurekandi kann hava egnar handilstreytir. Um tann vinnurekandi einsamallur hevur gjørt treytirnar, kann støðan vera tann, at avtalutreytirnar eru til fyrimun fyri tann vinnurekandi.

Áðrenn avtalan verður gjørd, skalt tú sum brúkari tryggja tær, at tað ið hevur týdning fyri teg, er við í avtaluni. Tað kann t.d. vera uppsagnar- ella avbíleggingartreytir, serligir eginleikar við einari vøru ella ein dagfesting.

### Broytingar í haldaraavtalum

Avtalur eru sum útgangsstøði bindandi, men vinnurekandi, sum bjóða eina haldaraskipan, kunnu í ávísan mun broyta t.d. treytir og prísir í haldinum. Tað er tó ein treyt, at vinnurekandi í rímiligari tíð seta seg í samband við einstøku viðskiftafólkini, áðrenn broytingin verður framd. Tað er ikki nóg mikið, at kunning um hesar broytingar eru at finna í hølunum hjá tí vinnurekandi ella á heimasíðuni hjá tí vinnurekandi. Er talan um týðandi broytingar, t.d. munandi príshækking, skal kunningin koma fram í rímiligari tíð, soleiðis at tað er møguligt hjá viðskiftafólkinum at siga haldið frá sær, áðrenn prísbroytingin kemur í gildi.

Nakrar broytingar eru av so stórum týdningi, at neyðugt er at gera eina nýggja avtalu. Er broytingin til fyrimun fyri teg sum brúkara, t.d. ein príslækking, kann broytingin verða gjørd, uttan at tann vinnurekandi setir seg í samband við teg.

Tá tú sum viðskiftafólk skrivar undir avtalu, skal tann vinnurekandi kunna um rættin til at gera broytingar í avtalutreytunum. Harumframt skal upplýsast í avtaluni, at viðskiftafólkið skal hava møguleika at siga haldið frá sær, áðrenn broyting í avtalutreytum kemur í gildi.

### Avtalur við børn og ung

Vinnurekandi eiga at upplýsa í síni marknaðarføring, um talan er um klubbar ella hald, ið serliga venda sær móti børnum og ungum. Børn og ung undir 18 ár kunnu ikki melda seg inn í felag, klubbar ella tekna hald, uttan samtykki frá foreldrunum. Í hesum føri er talan um avtalur, ið innibera rættindi og skyldur, ið tann sum er undir 18 ár ikki sjálvur kann meta um ella taka sær ábyrgdina av. Børn og ung undir 18 ár kunnu sostatt ikki melda seg í haldaraskipan, mótvegis gjaldi, uttan so foreldur frammanundan góðkenna avtaluna.

## Burn Fitness fekk átalu og ávaring

Brúkaraumboðið fekk fráboðan frá borgarum um, at Burn Fitness hevði hækkað prísin á haldum teirra, uttan at tey høvdu fingið kunning um príshækkanina og í summum føri var kunningin komin ov seint fram.

> Ein borgari skrivaði soleiðis:
>
> *“Eg havi hald hjá Burn í miðbýnum. Eg eri lesandi og tískil havi eg goldið 279,00kr hvønn mánað síðan eg byrjaði at venja í desember 2021. Brádliga uttan ávaring ella nakað tekur Burn 309,00kr um mðr. Henda broyting hendi frá mai til juni í ár. Føli meg sera snýtta, tí talan er altso um 30,00kr meira um mánaðan, og tað følist nógv tá mann ikki eingongd verður spurdur um tað er í lagið.”*

Sambært § 1, stk. 1 í marknaðarføringslógini, skulu tey, sum eru fevnd av lógini sýna góðan marknaðarføringssið við atliti til brúkaran, vinnurekandi og almenn samfelagsáhugamál. Góður marknaðarføringssiður fevnir m.a. eisini um avtalutreytir v.m.

Burn Fitness vísti á, at í sambandi við munandi hækkað útreiðslustøði, varð neyðugt at hækka prísin á limahaldunum, galdandi frá 1. juni 2023. Príshækkingin fevndi um øll limahald, uttan trý sløg. Prísurin hækkaði við ávíkavist kr. 20,- ella kr. 30,- um mánaðin, alt eftir hvat limahald talan var um.

Tann 10. mai 2023 um kvøldið vóru kunnandi teldupostar sendir út til áleið 1100 limir, umvegis bókingarskipanina hjá Burn Fitness. Men av onkrari orsøk kom ein partur av teldupostunum ikki fram fyrr enn 21. mai og ein annar partur kom als ikki fram til limirnar, sum vórðu raktir av príshækkingunum.

**Niðurstøða**

Í fyrstu atløgu metti Brúkaraumboðið, at hóast allir limirnir høvdu fingið teldupostin tann 10. mai 2023, metti Brúkaraumboðið at henda kunningin kom ov seint óansæð. Tað er umráðandi at boðað verður frá broytingum í rímiligari tíð, soleiðis at viðskiftafólk hava møguleika at slíta avtaluna, áðrenn broytingin verður framd.

Í viðskiftatreytunum hjá Burn Fitness stóð, at um limir ynsktu at slíta hald teirra, skuldu teir boða frá áðrenn tann 15. í mánaðinum fyri. Brúkararumboðið metti, at tað var ov stutt tíð, tá limirnir bert fingu 4-5 dagar at umráða seg í, og helt at kunningin átti at verða limunum í hendi minst 14 dagar áðrenn seinastu uppsagnarfreist.

Í aðru atløgu varð víst á, at tað er Burn Fitness, sum hevur ábyrgdina av at tryggja, at skipanin virkar, soleiðis at kunningin kemur út til limirnar, tá teldupostarnir verða sendir. Tað er ivasamt, hvussu nógvir limir fingu teldupostin ávikavist 10. mai og 21. mai. Tað er eisini ivasamt, hvussu nógvir limir als ikki fingu kunning.

Brúkaraumboðið metti tí, at Burn Fitness hevði framt brot á góðan marknaðarføringssið, sambært § 1 í marknaðarføringslógini. Harumframt varð brot eisini framt á § 82, stk. 1 í gjaldslógini, tí at limirnir, sum onga kunning fingu áðrenn freistina 15. mai, høvdu ikki givið samtykki til, at broytta upphæddin kundi flytast av kontuni.

Brúkaraumboðið gav felagnum eina átalu og eina ávaring fyri brotini, og heitti á Burn Fitness, at tryggja, at marknaðarførings-lógin og gjaldslógin verða hildnar framyvir.

# Kapittul 5

## Prísir

### Samlaður prísur skal upplýsast

Í § 13 í marknaðarføringslógini er ásett, at:

"*Í samband við vinnuligt útboð av vørum til brúkarar, tó undantikið søla av vørum á uppboðssølu, skal við merking, skelting ella á annan hátt týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld*."

Marknaðarføringsprísir, ið venda sær til brúkarar, skulu altíð vera íroknað mvg. Tað er ikki nóg mikið at upplýsa, at mvg verður lagt afturat. Prísur kann bert upplýsast uttan mvg, um marknaðarføringin einans vendir sær til vinnuligt virksemi. Tað skal verða greitt tilskilað í lýsingini, at marknaðarføringin einans vendir sær til vinnuligt virksemi.

Um marknaðarføringin vendir sær til bæði brúkarar og vinnufyritøkur, kanst tú velja at upplýsa prís uttan mvg, um prísurin við mvg eisini verður upplýstur. T.d. kann prísmarknaðarføring til bæði brúkarar og vinnuna vera: 125 kr. (100 kr. u/mvg)

Um tú sum vinnurekandi ivast í, um marknaðarføringin vendir sær til bæði brúkarar og vinnufyritøkur, eigur tú at upplýsa prís við og uttan mvg.

Brúkaraumboðið hevur valt út tvey mál, sum verða umrødd niðanfyri

### Skelting við prísi uttan pant er ikki loyvt

Brúkaraumboðið fekk fráboðan frá einum borgara um ein handil, sum marknaðarførdi prís á fløskum uttan pant. Í hesum føri var talan um fløskur av merkinum Kirvi. Tá borgarin kom til kassan var prísurin nakrar krónur hægri enn upplýsti prísurin á skeltinum, tí pantið varð lagt afturat við kassan. Tað vil siga, at borgarin ikki hevði møguleikan at síggja fulla prísin á vøruni, áðrenn hann fór at gjalda.

Tá fyritøkur selja til privatar brúkarar, skal fyritøkan altíð upplýsa endaliga prísin, tvs. íroknað fløskupant ella onnur avgjøld. Brúkarin skal fáa upplýst fullfíggjaðan prís fyrstu ferð brúkarin sær prísin. Hetta er galdandi bæði í lýsingum og tá talan er um keyp í handli.

Brúkaraumboðið bað handilin um alt fyri eitt at rætta prísirnar soleiðis, at tað sást, hvat samlaði prísurin er íroknað fløskupant.

## Fyritøka upplýsti einans prísir uttan mvg, hóast sølu til privatkundar

Brúkaraumboðið fekk fráboðan um, at prísir á heimasíðu hjá eini fyritøku einans vórðu upplýstir uttan meirvirðisgjald.

Brúkaraumboðið setti seg í samband við fyritøkuna, og vísti á, at tá fyritøkur selja til privatar brúkarar, skal fyritøkan altíð upplýsa endaliga prísin, t.v.s. íroknað mvg. Brúkarin skal fáa upplýst fullfíggjaðan prís fyrstu ferð brúkarin sær prísin. Hetta er galdandi bæði í lýsingum og tá talan er um keyp á heimasíðu.

Fyritøkan bjóðaði eisini tænastur til privatar persónar út á heimasíðuni. Prísirnir á hesum tænastum vóru heldur ikki upplýstir við mvg.

Brúkaraumboðið bað fyritøkuna rætta prísirnar alt fyri eitt, so kundarnir kundu síggja, hvat samlaði prísurin var.

Fyritøkan broytti prísirnar beinanvegin, og Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.

## Stakroyndir av tilboðsbløðum og heimasíðum

Í september og oktober í 2023 gjørdi Brúkaraumboðið stakroyndir av tilvildarliga útvaldum vørum í tilboðsbløðum og á heimasíðum hjá veitarum av gerandisvørum, klædnavørum og vælveruvørum á føroyska marknaðinum. Í summum føri var fyritøkan tilvildarliga útvald, og í øðrum føri hevði Brúkaraumboðið fingið fráboðan um, at prísirnir hjá fyritøkuni ikki vóru rættir.

Brúkaraumboðið bað fyritøkurnar um at skjalprógva príslækkingina við at upplýsa upprunaprís á tilboðsvøruni, soleiðis at staðfestast kundi, um talan var um verulig tilboð.

Eisini kannaði Brúkaraumboðið, um fyritøkan í minst seks vikur (fýra vikur fyri gerandisvørur) hevði havt marknaðarførdu tilboðsvøruna til sølu til upplýsta upprunaprísin. Vísast varð á, at sum upprunaprísur skal upplýsast tann lægsti prísurin, sum vøran hevur kostað tær síðstu 6 vikurnar (4 vikur fyri gerandisvørur).

Um upplýsti upprunaprísurin ikki er rættur, er talan um villleiðandi marknaðarføring, sambært § 3 í marknaðarføringslógini. Sambært § 9, stk. 2 í marknaðarføringslógini, má útsøla ella onnur søla, har søluprísir eru lækkaðir, bert fráboðast, um so er, at príslækkingin er verulig. Príslækkingin skal, um neyðugt, skjalprógvast. Stakroyndirnar hjá Brúkaraumboðnum vístu, at ymiskt var, hvussu fyritøkurnar megnaðu at skjalprógva upprunaprísin.

## Stakroyndir av gerandisvørum

Brúkarumboðið setti seg í samband við Bónus Miðlon, Bónus Norðskála og Bónus Klaksvík, og bað um skjalprógv fyri upprunaprís á útvaldum tilboðsvørum. Brúkaraumboðið fekk upplýst frá søluleiðaranum, at prísirnir í handlunum eru miðstýrdir, og tí eru prísirnir fyri eina vøru teir somu fyri allar handlarnar. Brúkaraumboðið fekk avrit av vørukortinum viðvíkjandi teimum útvaldu tilboðsvørunum, og kundi staðfesta, at handlarnir megnaðu at skjalprógva upprunaprísin á tilboðsvørunum. Í øðrum lagi megnaðu handlarnir eisini at skjalprógva, at upprunaprísurin hevði verið hin sami fýra vikur undan tilboðnum. Brúkaraumboðið gjørdi tí ikki meira við málið.

Stakroyndir vórðu eisini gjørdar av Samkeyp á Strondum, Samkeyp á Tvøroyri, Samkeyp í Sandavági og Samkeyp á Eiði. Samkeyp er eitt marknaðarføringssamstarv millum sjálvstøðugar handlar. Talan er tí ikki neyðturviliga um sama upprunaprís fyri tilboðsvøruna í øllum handlunum. Av hesi orsøk eru upprunaprísir ikki upplýstir í lýsingarblaðnum, men í staðin verður upplýst, hvør minsta sparingin av einum tilboðið er í krónum.

Brúkaraumboðið fekk upplýst, at smærru handlarnir hava tí avbjóðing, at ikki allir hava telduskipanir, sum kunnu vísa upprunaprísin aftur í tíð. Tí var torført at lyfta próvbyrðuna fyri upprunaprísin av niðursettu vørunum fýra vikur undan tilboðnum. Summir handlar megnaðu als ikki at lyfta próvbyrðuna um upprunaprís fyri tilboðsvøru. Kortini kundu handlarnir á Tvøroyri og á Strondum leita fram kvittanir úr telduskipanini, ið vístu upprunaprísin á seldu tilboðsvøruni.

## Klædnahandlar

Stakroyndir vórðu gjørdar av tilboðsvørum hjá klædnahandlunum Bob and Marilyn´s suitcase í Tórshavn og Vørðsluni í Fuglafirði. Hesar fyritøkur hava bæði nethandil og fysiskan handil. Eisini hjá hesum fyritøkum var tað ein avbjóðing at skjalprógva upprunaprís seks vikur undan tilboðnum, tí telduskipanin ikki hevur tann møguleikan. Vørðslan vísti tó á, at til bar at síggja upprunaprís á vøru, men bert um júst tann vøran varð seld yvir nethandilin seks vikur undan tilboðnum.

Vørðslan hevði eisini vøru, sum var lýst upp á tilboð, hóast vøran ongantíð hevði verið til sølu fyri upprunaprísin. Talan var í hesum føri um vøru, sum Vørðslan hevði fingið bíligari frá sínum veitara.

Brúkaraumboðið vísti á, at tá ein vøra bert verður seld fyri niðursettan prís, er talan ikki um eitt tilboð, men heldur um ein fastan lágprís. Brúkaraumboðið vísti á, at talan er um villleiðandi marknaðarføring, og skeiva prísupplýsing.

Brúkaraumboðið bað handilin um at rætta marknaðarføringina soleiðis, at talan ikki er um eitt tilboð, men heldur um fastan lágprís. Handilin hevur boðað frá, at tey hava broytt marknaðarføringina.

## Manglandi telduskipan

Brúkaraumboðið metir, at tað hevur alstóran týdning, at eftirlit kann verða gjørt, og at brúkarin fær røttu upplýsingar, tá talan er um prís og tilboðsprís. Avbjóðingin við stakroyndunum var serliga viðvíkjandi manglandi telduskipan ella avmarkaðum funktiónum í telduskipanini hjá smærru handlunum. Brúkaraumboðið umhugsar, hvussu skipanin skal vera framyvir, tá stakroyndir verða gjørdar, og hevur boðað Samkeyp og klædnahandlunum frá, at mannagongdirnar fyri stakroyndir verða broyttar, og at nýtt eftirlit av gerandis- og klædnavørum verður gjørt seinni.

## Vælveruvørur

Tá talan er um vælveruvørur, gjørdi Brúkaraumboðið stakroyndir av gávueskjum, sum vóru á tilboð á heimasíðuni hjá Madame Vælveru í Klaksvík. Brúkaraumboðið fekk upplýst, at upprunaprísurin fyri gávueskjurnar, var hin sami sum tilboðsprísurin. Gávueskjurnar hava sostatt ein prís, sum tær kosta alt árið. Tá vørur verða settar saman í gávueskju, eru tær vanliga bíligari, enn um brúkarin skuldi keypt vørurnar hvør sær. Brúkaraumboðið vísti á, at tá ein vøra er niðursett alt árið, er talan ikki um eitt tilboð, men heldur um ein fastan lágprís. Brúkaraumboðið vísti á, at talan var um villleiðandi marknaðarføring, og skeiva prísupplýsing.

Brúkaraumboðið bað handilin um at rætta marknaðarføringina soleiðis, at talan ikki var um eitt tilboð, men heldur um fastan lágprís. Handilin boðaði frá, at tey høvdu broytt marknaðarføringina.

# Kapittul 6

## Gávukort

### Um gávukort

Sambært fyrningarlógini fyrnast gávukort sum útgangsstøði eftir 5 árum, um onnur avtala ikki er gjørd. Um onnur freist er avtalað, skal henda ikki vera órímiliga stutt. Eingin føst regla er fyri, hvussu stutt freistin tá kann vera, men meginreglan er, at móttakarin skal hava høvi at brúka gávukortið. Fatanin hjá Brúkaraumboðnum er, at ein freist styttri enn 1 ár, er ikki góður marknaðarføringssiður.
Um fyrningarfreistin er styttri enn 5 ár, skal hetta skrivast á gávukortið.

Fær handilin nýggjan eigara ella fer hann á húsagang, kann peningurin verða mistur ella ógvuliga trupul at fáa aftur. Fer virkið av knóranum, kanst tú ikki seta seljaranum krav, men mást leggja kravið inn fyri trotabúgvið.

Tí er tað altíð eitt gott hugskot at brúka gávukort og áognarseðil skjótast til ber.

### Elektronisk gávukort

Gávukort kunnu verða elektronisk, og skilagott er at verða varugur við hetta, tí her eru aðrar reglur galdandi enn fyri vanlig gávukort. Brúkaraumboðið umsitur partar av gjaldslógini, og eru elektroniskar tænastur og peningur, m.a. gávukort, fevnt av gjaldslógini. Er talan um elektroniskt gávukort ber til hjá ánaranum av elektroniska peningin at fáa virðið av hesum goldið út í gildistíðini og upp til eitt ár eftir, at gildistíðin er liðin. Hetta er sambært § 96, stk. 2, í gjaldslógini. Henda reglan er galdandi, hóast virkið ella fyritøkan t.d. hevur skrivað á gávukortið, at upphæddin ikki kann verða goldin út í reiðum peningi.

**Nær er talan um elektronisk gávukort?**

Eitt gávukort er elektroniskt um tað kann avlesast elektroniskt. Talan kann t.d. verða um eitt fysiskt gávukort við kippi, magnetstrípu, strikukotu ella aðrari kotu, sum kann avlesast ella innskrivast elektroniskt. Niðanfyri eru dømir um, hvat vanliga verður brúkt til avlesan av elektroniskum gávukortum.

Sí dømi niðanfyri:



**Hvør kann gjalda út peningin á elektroniska gávukortinum?**
Tað er tann, ið gevur gávukortið út, sum eisini verður tann, ið skal gjalda út virðið á gávukortinum. Tað er sostatt tann fyritøkan, sum gávukortið er fingið frá, sum eisini verður hon, ið skal geva virðið aftur.

**Kann fyritøkan krevja eitt ómaksgjald fyri at geva út virðið á gávukortinum**?
Ánarin av tí elektroniska peninginum kann verða kravdur eftir ómaksgjaldi, um persónurin biður um at fáa útgjalding, áðrenn gildistíðin er runnin. Ómaksgjaldið skal tó vera avrátt frammanundan. Tá ið gilditíðin er liðin og upp til eitt ár eftir tað, kann ánarin harafturímóti ikki verða kravdur eftir ómaksgjaldi fyri útgjalding – sama hvat stendur í avtaluni. Ánarin kann tó ikki krevja at fáa goldið út virðið longur enn eitt ár eftir, at gildistíðin er liðin.
Ómaksgjaldið skal samsvara við útreiðslurnar, ið standast av at fáa virðið útgoldið. Eru útreiðslurnar órímiliga høgar, má ómaksgjaldið tó ikki vera samsvarandi høgt.

**Treytir og undantøk**
Avgerðandi er, at kortið kann nýtast til eitt úrval av vørum og tænastum. Kort, ið eru útskrivað til eina einstaka, ávísa veiting, t.d. eitt atgongumerkið til ein ávísan fótbóltsdyst, ein ávísan dag og eina ávísa klokkutíð, kunnu ikki gjaldast út.

Tað skal verða goldið fyri gávukortið, antin beinleiðis ella óbeinleiðis. Gávukort, ið tú fært, tá tú skiftir eina vøru um, hevur tú eisini rætt til at fáa útgoldið, um tað er elektroniskt og kann nýtast til at keypa vørur og tænastur. Gávukort, sum verða givin ókeypis, t.d. í vælgerðararbeiði ella í samband við stuðulsarbeiðið, kunnu ikki gjaldast út.

## Tilboðspakki við avmarkaðari gildistíð í tráð við marknaðarføringslógina

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning frá borgara um gávukort, sum borgarin hevði keypt frá einum hotelli. Borgarin greiddi frá, at hann hevði keypt gávukortið í desembur 2022, og at gávukortið stóð til at ganga út 1. mai 2023. Borgarin undraðist á støðuna, tí gildistíðin var so sera stutt.
Brúkaraumboðið setti seg í samband við hotellið, og fekk upplýst, at talan var ikki um eitt vanligt gávukort, men heldur um tilboðspakkar ella upplivingarpakkar, sum eru samansetingar av tveimum ella fleiri vørum.
Hotellið vísti á, at tey eisini høvdu vanlig gávukort til sølu, við 5 ára gildistíð.
Men í hesum føri, var talan um tilboðspakkar við stórum avsláttri í mun til vanligan prís, men hinvegin kundi tilboðið bert brúkast í avmarkaðari tíð. Brúkaraumboðið greiddi hotellinum frá, at tá talan er um slíkar tilboðspakkar, er týdningarmikið, at gildistíðarskeiðið er so mikið langt, at tað er væl og virðiliga møguligt hjá borgarum at brúka

tilboðspakkan, áðrenn hann gongur út.
Í hesum føri var talan um 4-5 mánaðar, og hotellið grundgav fyri, hví gildistíðarskeiðið var so stutt í hesum føri, og Brúkaraumboðið metti, at atlitini vóru saklig og viðkomandi.
Eisini vísti Brúkaraumboðið á, at tað er sera týdningarmikið at upplýst verður um, at gildistíðin er stutt. Hetta metti Brúkaraumboðið eisini, at hotellið hevði gjørt.
Brúkaraumboðið mælti tó til, at hotellið framyvir ikki brúkti orðini "gávubræv" ella "jólagávukort" um slíkar tilboðspakkar. Orðini líkjast so nógv orðinum "gávukort", og kann tað vera torført hjá borgarum at skilja í millum.

Hotellið tók tilmælið frá Brúkaraumboðnum til eftirtektar, og Brúkaraumboðið gjørdi sostatt ikki meira við málið.

# Kapittul 7

## Forhandarmeting

Virkir og stovnar kunnu biðja Brúkaraumboðið um at gera eina sokallaða forhandarmeting um ætlaða marknaðarføring. Hetta er ein meting um ætlaða marknaðarføringin er í samsvar við marknaðarføringslógina, og er at meta sum ein vegleiðing heldur enn ein endalig støðutakan. Ábyrgdin fyri, at eitt marknaðarføringstiltak er lógligt liggur altíð hjá tí vinnurekandi.

Tá Brúkaraumboðið hevur latið eina forhandarmeting til ein vinnurekandi um, at eitt ætlað marknaðarføringstiltak eftir fatanini hjá Brúkaraumboðnum er lógligt, kann Brúkaraumboðið ikki av sínum eintingum mótvegis tí vinnurekandi reisa eitt mál í sambandi við eitt átak, sum er umfatað av forhandarmetingini og sett í verk innan rímiliga tíð eftir, at forhandarmetingin er latin.

Ein slík meting verður tó ikki gjørd, um støðutakanin kann skapa serligan iva, ella onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Vegleiðandi kann væntast, at tvær vikur ganga til viðgerðina av eini forhandarmeting. Hetta kann vera styttri ella longri alt eftir arbeiðsbyrðuni hjá Brúkaraumboðnum. Gott er tí at vera í góðari tíð við áheitan um forhandarmeting.

## Forhandarmeting viðvíkjandi upplivingargávukortum

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning um forhandarmeting viðvíkjandi upplivingar-gávukortum. Fyrispurningurin snúði seg um, hvørt tað var krav, at virðið á vøruni ella tænastuni skuldi standa á gávukortinum.

Brúkaraumboðið vísti á, at um talan er um elektronisk gávukort, t.d. kort við flís, magnetstrípu, strikukotu ella aðrari kotu til elektroniska avlesing ella innsláttur, skal prísur standa á.

Fyritøkan svaraði, at talan var ikki um elektronisk gávukort. Vøran ella tænastan verður skrivað á kortið, og so verður kortið handað ella vekslað um til vøru á staðnum.

Brúkaraumboðið vísti á, at um talan ikki er um elektronisk gávukort, nýtist prísur ikki at standa á gávueskjuni sjálvari. Tá er nokk, at keyparin veit, hvat hann skal gjalda.

Fyritøkan spurdi síðan, um tað er nokk at hava eina QR-kotu á kortinum, har treytir kunnu lesast. Kortið var so lítið, at tað var trupult at fáa allan tekstin á kortið.

Brúkaraumboðið metti, at tað var í lagi at treytirnar eru at finna við at skanna QR

kotuna. Vísandi til § 1 í marknaðarførings-lógini, um góðan marknaðarføringssið, mælti Brúkaraumboðið til, at gildistíðin verður upplýst á sjálvum kortinum. Hetta fyri at gera tað greitt fyri brúkaran, at kortið bert er galdandi í 1 ár frá tí degi tað er keypt.

## Forhandarmeting um átak hjá handli við virðisseðlum

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning um átak um avsláttarseðlar var sambæriligt við marknaðarføringslógina.

Átakið snúði seg um, at øll sum keyptu fyri yvir 300,- í ávísum handli eitt ávíst tíðarskeið, fingu ein avsláttarseðil ella ein sonevndan virðisseðil. Hesin seðilin gav 15% í avsláttri av keypi upp til kr. 2.000,-. Ávísar vørur vóru tó undantiknar avsláttrinum.

Brúkaraumboðið metti, at átakið var í tráð við marknaðarføringslógina, men vísti á, at sambært § 9, stk. 1 í marknaðarførings-lógini, skuldu treytirnar vera týðiligar og greiðar, og brúkarin skuldi lættliga hava møguleika at kunna seg um treytirnar.

Brúkaraumboðið vísti eisini á viðmerkingarnar til marknaðarførings-lógina og seinni broytingar, sum nágreina ætlanina við § 9 um sølufremjandi átøk. Hesar siga m.a. at upplýsast skal, hvørjar treytir og avmarkingar eru galdandi fyri avsláttur in, hvussu brúkarin fær avsláttur, og hvussu avslátturin kann brúkast.

## Forhandarmeting til uppsparingskontu hjá banka

Brúkaraumboðið fekk fyrispurning frá einum banka um eitt komandi lýsingarátak hjá bankanum, sum snúði seg um eina uppsparingskontu.

Bankin ynskti at fáa eina forhandarmeting frá Brúkaraumboðnum í samband við lýsingarátakið, fyri at vita um hetta var sambæriligt við marknaðarføringslógina.

Bankin upplýsti, at lýsingarátakið vísti á, at bankin bjóðaði eina uppsparingskontu við góðari rentu uttan binding.

Brúkaraumboðið gjørdi vart við § 3 í marknaðarføringslógini, sum ásetir, at ikki er loyvt at nýta skeivar upplýsingar ella leggja burturúr týðandi upplýsingar. Tískil skal bankin til eina og hvørja tíð kunna skjalprógva eitt uppáhald um, at henda uppsparing gav Føroya bestu rentu uttan binding.

Bankin skrivaði harumframt í treytunum til uppsparingskontuna, at revsirentan (dekort) varð ókeypis. Men hetta var ikki treytaleyst, tí tað bert var ein flyting um mánaðan, sum var ókeypis. Eftirfylgjandi kostaði hvør flyting 40 kr.

Hetta var tískil ikki heilt rætt sambært marknaðarføringslógini, og Brúkaraumboðið heitti tí á bankan um at fáa hetta upplýst, so

borgarin  alt fyri eitt fekk eygað á, at ókeypis revsirenta var treytað av, at tað bert verður framd ein flyting um mánaðan.

Bankin tók viðmerkingarnar frá Brúkaraumboðnum til eftirtektar.

# Kapittul 8

## Gjaldslóg

### Kontantreglan

Brúkaraumboðið umsitur og hevur eftirlit við einum parti av gjaldslógini, herundir tí sokallaðu kontantregluni. Meginreglan er, sambært § 81, 1. stk. í gjaldslógini, at tey, sum taka ímóti peningi, hava skyldu at taka ímóti reiðum peningi í tíðini frá kl. 06.00 og til kl. 22.00, um tey taka ímóti gjaldskorti ella fargjalding um app.

§ 81 í gjaldslógini er soljóðandi:

*“**§ 81.** En betalingsmodtager er forpligtet til at modtage betaling med kontanter i tidsrummet fra kl. 06.00 til kl. 22.00, hvis denne modtager betalingsinstrumenter omfattet af denne lov, jf. dog stk. 2, 3 og 5.*

*Stk. 2. Stk. 1 finder ikke anvendelse ved fjernsalg eller ved betalingstransaktioner i ubemandede selvbetjeningsmiljøer.*

*Stk. 3. Betalingsmodtagere, som er beliggende i områder, hvor der kan være en forhøjet risiko for røveri forbundet med modtagelse af kontanter, er uanset stk. 1 alene forpligtet til at modtage kontanter fra kl. 06.00 til kl. 20.00. Erhvervsministeren fastsætter, i hvilke områder på Færøerne der kan være en forhøjet risiko for røveri forbundet med modtagelse af kontanter. Erhvervsministeren offentliggør en meddelelse herom på Erhvervsministeriets hjemmeside.*

*Stk. 4. Betalingsmodtagere, der ønsker kun at modtage kontanter fra kl. 06.00 til kl. 20.00, jf. stk. 3, skal forinden underrette Finanstilsynet herom.*

*Stk. 5. Erhvervsministeren kan fastsætte regler om, at bestemte typer af betalingsmodtagere er forpligtet til altid at modtage betaling med kontanter uanset stk. 1-3.”*

#### Ætlanin við kontantregluni

Kontantreglan hevur sum endamál at forða fyri, at mismunur verður gjørdur á kontantkundum, og tí mugu gjaldsforðingar ikki verða settar, ið bara eru galdandi fyri kontantkundarnar.

Tað kann ikki verða farið uttan um regluna við t.d. at lýsa við, at her verður ikki tikið ímóti reiðum peningi, ella at siga, at handilin ikki hevur vekslipening.

Harafturat metir Brúkaraumboðið, at tað er brot á kontantregluna, um eitt virki fær sær eina skipan, har kontantkundarnir skulu gjalda eina upphædd í reiðum peningi inn á eitt elektroniskt kort, sum síðani kann verða nýtt at gjalda við.

Eftir meting Brúkaraumboðsins verður brot ikki gjørt á kontantregluna í § 81 í gjaldslógini ella reglur í marknaðarføringarlógini um góðan sið, um

ein handil hevur einstakar avgreiðslukassar, ið ikki taka ímóti reiðum peningi, men tað hinvegin ber til at gjalda við reiðum peningi við ein ella fleiri av teim opnu avgreiðslukassunum. Her er tó tann treyt, at gjaldsmóttakarin/handilin kunnar um hetta væl og virðiliga á skeltum.

Brot á § 81, stk. 1 í gjaldslógini kann verða revsað við bót.

**Undantøk**

Skyldan at taka ímóti reiðum peningi er ikki galdandi fyri fjarsølu, sum t.d. netsølu (webshops) og onnur sløg av sølu um internetið og um telefonina.

Kontantreglan er heldur ikki galdandi fyri gjalding í ómannaðum sjálvavgreiðslu-støðum, sum t.d. ómannaðar bensinstøðir, sbr. § 81, stk. 2 í gjaldslógini.

Tað ber til at avmarka tað tíðarbilið, sum gjaldsmóttakarin hevur skyldu at taka móti reiðum peningi, frá kl. 06.00 til 20.00, um viðkomandi virki er í einum av teimum økjunum, sum Vinnumálaráðið hevur víst á at vera í serligum ránsvanda. Henda avmarking er ikki brúkt í Føroyum enn.

Liggur virkið hjá einum vinnurekandi í einum av hesum serliga ránshóttu økjunum, og virkið fegið vil nýta ta stuttu tíðina frá kl. 06.00 til 20.00, skal fíggjareftirlitið verða kunnað um tað frammanundan. Tílíkar upplýsingar frá fíggjareftirlitinum eru at finna á heimasíðu fíggjareftirlitsins.

Brúkaraumboðið hevur viðgjørt nøkur mál um kontantregluna, og verða tvey av teimum umrødd her.

## Brúkaraumboðið tók avgerð í máli um rættin at rinda við reiðum peningi

Brúkaraumboðið viðgjørdi eina klagu um rættin hjá einum borgara, at rinda árliga gjaldið fyri bátapláss við reiðum peningi.

Ein kommuna kravdi, at borgarar, sum høvdu bátapláss skuldu stovna eina sjálvvirkandi gjaldsavtalu fyri árliga gjaldið. Ein borgari kærdi, tí hann ynskti at sleppa at rinda árliga gjaldið fyri bátaplássið við reiðum peningi.

Niðurstøðan hjá Brúkaraumboðnum var, at tá tað er møguligt at rinda við gjaldskorti á kommunuskrivstovuni, so hevur borgarin rætt til at rinda bátaplássið við reiðum peningi.

Brúkaraumboðið vísti á, “kontantregluna” í § 81, stk. 1 í gjaldslógini, sum ásetir, at gjaldsmóttakarar hava skyldu at taka ímóti reiðum peningi í tíðini frá kl. 06.00 til kl. 22.00, um teir taka ímóti t.d. gjaldskorti.

Tað vil í hesum føri siga, at um ein kommunuskrivstova hevur gjaldsterminal, har til ber at rinda við gjaldskorti, so hevur kommunuskrivstovan eisini skyldu til at taka ímóti kontantum peningi í avgreiðslutíðini.

Kommunan hevði gjaldsterminal á kommunuskrivstovuni, ið varð brúktur til at fylla á el-kort, ið bátaeigarar nýta í bátahyljunum.

Kommunan hevur víst á, at tað má vera eitt veruligt samband millum "søluna" umvegis gjaldskort og kravið um at sleppa at gjalda kontant. Kommunan "selur" ikki bátapláss umvegis gjaldskort og tískil kann tað ikki vera nakað krav um at móttaka kontant gjald fyri bátapláss.

Brúkaraumboðið hevur víst á, at kontantreglan í § 81, stk. 1 skilir ikki í millum ymsar vørur og tænastur. Ásetingin er generel, og er sum útgangsstøði galdandi fyri allar vørur og tænastur. T.v.s. um ein kommuna (sum gjaldsmóttakari) tekur ímóti gjaldskorti fyri ávísar vørur ella tænastur, viðførir tað, at kommunan eisini má taka ímóti reiðum peningi fyri aðrar vørur og tænastur.

Í "kontantregluni" eru nøkur undantøk, har rætturin til at rinda við reiðum peningi ikki er galdandi. Brúkaraumboðið hevur kannað, um kommunan lýkur treytirnar fyri undantøkunum, men niðurstøðan er, at tað ger kommunan ikki í hesum føri. Tískil skal borgarin hava møguleika til at rinda við reiðum peningi fyri bátaplássið.

## Ikki møguligt at rinda kontant fyri brennievni

Brúkaraumboðið varð gjørt varugt við, at tað ikki var møguligt, at rinda kontant fyri brennievni á eini bensinstøð. Brúkaraumboðið setti seg tí í samband við støðina og bað um frágreiðing. Støðin greiddi frá, at tey, eins og aðrar støðir, ið selja brennievni hava ta avbjóðing, at fólk ikki gjalda fyri brennievni. Talan er serliga um ferðafólk í leigubilum. Hesi fylla brennievni á bilin, áðrenn tey seta gjaldskortið í, og so halda tey, at tey hava goldið. Støðin hevði sett upp vegleiðing um, hvussu tey gjalda, men tað hevði ikki hjálpt. Hóast støðin hevði kannað nummarspjaldur og roynt at funnið fram til leigubilafyritøkurnar, varð tað ikki eydnast at fáa mista peningin aftur fyri brennievni. Harumframt greiddi støðin frá, at tey vóru ikki greið yvir, at tað ikki var loyvt at nokta at taka ímóti kontantum.

Brúkaraumboðið skilti væl trupulleikan, og vísti á, at í mun til gjaldslógina, er einki í vegin fyri, at fáa eina skipan, sum tryggjar, at brennievni ikki kann fyllast á, uttan at fyrst verður goldið fyri tað. Gjaldslógin ásetir, at um ein vinnurekandi móttekur gjaldskort, so skal hann eisini móttaka reiðan pening.Tí er tað týdningarmikið, at tað eisini skal verða møguligt at rinda við reiðum peningi.

Brúkaraumboðið bað støðina, um at lata upp aftur fyri møguleikanum at rinda brennievni við reiðum peningi.

Støðin greiddi frá, at tey taka uppslagið niður, og fara skjótast gjørligt at fáa eina skipan, við trimum gjaldsmøguleikum. Ein gjaldsmøguleiki verður, at til ber at gjalda við reiðum peningi áðrenn brennievnið verður fylt á.

# Vegleiðingar og kunning



Brúkaraumboðið

# Frámerkja lýsingar á sosialum miðlum

Ert tú ávirkari ella marknaðarførir tú vørur og tænastur á tínum vanga á sosialum miðlum, er gott at kunna teg um, hvussu tú heldur teg innan lógarinnar karmar.

## Nær er talan um lýsing og marknaðarføring?

Lýsingar og marknaðarføring er øll kunning, sum kann vera við til at fremja søluna hjá einum vinnurekandi av einari vøru ella tænastu, og sum tú leggur út, tí at tú fært gjald fyri tað, ella fært aðrar fyrimunir við at gera tað.

## Hvat mást tú frámerkja?

Tú mást frámerkja alt, sum kann fremja sølu av vøru ella tænastu fyri vinnurekandi, og sum tú leggur út, tí tú fært pening fyri tað, ella tí tú fært aðrar fyrimunir við at varpa ljós á tað. Dømi um lýsing, sum skal hava frámerki:

- Tú fært goldið fyri at leggja eitthvørt út um eina vøru ella ein vinnurekandi.
- Tú sleppur at læna eitthvørt, sleppur at vera við í onkrum, fært ymist ókeypis, fært eina tænastu ella ferð ókeypis ella við avsláttri. Afturfyri verður væntað av tær, at tú  varpar ljós á tað fyri ein vinnurekandi.
- Tú hevur eina avtalu um at vera „ambassadørur“, „samstarvsfelagi“ ella tílíkt.
- Tú hevur kappingar ella «giveaways» fyri ein vinnurekandi.
- Tú brúkar lýsingaleinki, sum gevur tær samsýning, t.d. fyri hvørt klikk ella keyp.
- Tú fremur sølu av vørum ella tænastum, sum tú sjálv/ur hevur áhuga í, sostatt eginlýsingar.

## Hvussu gert tú frámerki?

Øll skulu kunna skilja, at tað er lýsing frammanundan ella samstundis sum tey síggja tað, tú hevur lagt út. Tað hevur við sær:

- At tú mást týðiliga nýta orðið „lýsing“. Onnur orð sum "í samstarvi við", "kapping", "viðmæli fyri", "boðin" ella "[navn á fyritøku]" eru ikki nóg mikið.
- At frámerkið má standa ábært við týðiligari skrift og stórum stavum.
- At tað má vera greitt, hvørjum tú lýsir fyri.
- At frámerkið eisini er týðiligt, tá ið innlegg við lýsing verður deilt á øðrum miðlum.

## Hvar eru hesi krøv galdandi?

Krøvini galda fyri allar sosialar miðlar so sum bloggar, Facebook, Instagram, TikTok, YouTube, Twitter og Snapchat o.o.

## Hevur tú fleiri spurningar?
Brúkaraumboðið hevur eisini gjørt eina meiri fullfíggjaða vegleiðing um at frámerkja lýsingar í sosialum miðlum. Hana finnur tú við at klikkja Her.

## Fylg lógini!
Lýsarar, netverk og lýsingastovur, tú starvast saman við, hava eisini ábyrgd av, at lógin verður fylgd. Brúkaraumboðið hevur heimild at banna ólógliga marknaðarførslu. Brot kunnu revsast við bót.

# Kappingar á sosialum miðlum

## Yvirlit yvir reglurnar í marknaðarføringslógini

### Hetta kanst tú gera:

- Tú kanst gera eitt uppslag á tínum egna vanga ella síðu.
- Tú kanst biðja fólk skriva eina viðmerking fyri at luttaka - t.d. "Viðmerk undir uppslagnum hvønn lit tær dámar best".
- Tú kanst biðja fólk dáma eina síðu fyri at luttaka.
- Tú kanst biðja fólk dáma og deila eitt uppslag fyri at luttaka.

### Hetta kanst tú IKKI gera:

- Tú kanst ikki krevja, at fólk skulu senda eini privat boð við marknaðarføring fyri at luttaka.
- Tú kanst ikki krevja, at fólk skulu frámerkja ein vin í uppslagnum fyri at luttaka.

Les meira á bruk.fo

Brúkaraumboðið

# Black Friday – góð ráð

Novembur er stórur útsølumánaður. Borgarar eru spentir at fáa fatur á teimum bestu tilboðunum uppá alt frá telefonum til klæðir, búnýti, skógvar o.s.fr. Lat tó ikki lýsingasnildirnar lumpa teg.

Tá marknaðarført verður við “útsølu”, “tilboð”, “Black Friday prísur” ella líknandi, er týdningarmikið, at prísurin veruliga er lækkaður, og at gamli fasti prísurin (undanprísurin) er upplýstur. Undanprísir skulu vera sannir. Vanliga skal lægsti undanprísur framman undan søluni vera settur á, og vøran skal veruliga verða seld fyri tann prísin.

**Undanprísurin skal hava verið galdandi í ávíkavist 6 og 4 vikur undan tilboðnum**

Tað er av týdningi, at tann vinnurekandi upplýsir undanprísin umframt núverandi prísin, so brúkarin alt fyri eitt sær, hvussu nógv hann kann spara. Meginreglan er, at undanprísurin skal hava verið galdandi í minsta lagi 6 vikur, áðrenn tilboðið kemur í gildi. Fyri gerandis – og árstíðarbundnar vørur, t.d. matvøru ella jólaprýði, er kravið 4 vikur. Upplýsast skal tann lægsti prísurin, ið vøran hevur kostað tær síðstu 6 vikurnar (4 vikurnar fyri gerandis – og árstíðarbundnar vørur).

**Avmarkað nøgd**

Um talan bert er um fá eintøk til sølu ella royndirnar vísa, at tilboðið er so mikið gott, at væntast kann, at útselt verður skjótt, skal fyrivarni takast um avmarkaða nøgd.

Um nøgdin er sera avmarkað, skal upplýsast, hvussu nógv eintøk eru sett til sølu. Vanliga eru undir 10 stk. mett sum sera avmarkað.

Brúkaraumboðið heitir á øll vinnurekandi um at seta seg væl inn í reglurnar, soleiðis at marknaðarføringin ikki verður villleiðandi og ólóglig.

**Góð ráð til brúkaran:**

- Kanna um vøran veruliga er niðursett – hvussu nógv er at spara?
- Er vøran møguliga bíligari í einum øðrum handli/nethandli?
- Um tú keypir bil, møblar ella líknandi og í tí sambandi tekur lán – kanna samlaðar kredittútreiðslur.

**Góð ráð til vinnurekandi:**

- Minst til at upplýsa undanprísin á vøruni.
- Undanprísurin skal vera brúktur í rúma tíð áðrenn tilboðið byrjar (Sí tekstin omanfyri).
- Væntast at sølan av eini vøru verður stór, tí tilboðið er so mikið gott, minst so til at upplýsa um tað er avmarkað nøgd.
- Eru tíggju ella minni eintøk eftir av eini vøru, minst so til, at upplýsa tali á eintøkum, ið eru sett til sølu.
- Tað skal vera heilt greitt fyri brúkaran, um vøran verður seld fyri niðursettan prís ella um tað bert verður lýst fyri vøruni.

# Norðurlendskur fundur í Nuuk

Norðurlendsku brúkaraumboðini hittust í døgunum 29. og 30. august 2023 til árligan fund, sum hesaferð varð hildin í Nuuk. Á fundinum luttóku stjórarnir úr Føroyum, Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Grønlandi.

Tey norðurlendsku brúkaraumboðini hava í høvuðsheitum somu trupulleikar og avbjóðingar, tá ið lóggáva um marknaðarføring skal handhevjast. Lógarverkið er í stóran mun tað sama í øllum Norðurlondum, og tí er tað til stórt gagn, at brúkaraumboðini kunnu møtast og skifta orð um felags avbjóðingar á økinum.

Evni, sum vórðu umrødd á fundinum vóru m.a. verja av børnum í talgilda heiminum og um grønvasking av vørum og tænastum. Eisini vórðu norðurlendsku arbeiðsbólkarnir umrøddir, og avgjørt varð, at halda fram við teimum.

Brúkaraumboðini samdust um, at deila og samstarva um akademiska gransking um evnið marknaðarføring og børn, fyri at fáa betri vitan um, hvussu marknaðarátøk ávirka ungu brúkarnar.



F.v.: danski Forbrugerombudsmanden, svenski Konsumentombudsmanden og Brúkaraumboðið.



# Nordic Consumer Summit í Porsgrunn í Noregi

Norðurlendsku brúkaraumboðini samstarva á fleiri økjum. Millum annað eru fýra arbeiðsbólkar settir á stovn:

- Nordic Case Handler Group – Environmental claims
- Nordic Case Handler Group – Digital and data driven commercial practices
- Nordic Case Handler Group – Financial services
- Nordic Case Handler Group – Marketing directed to children

Bólkarnir hava javnan fund umvegis Teams, har mál av felags áhuga verða umrødd. Tann 14. og 15. novembur 2023 hittust bólkarnir fyrstu ferð á fysiskum fundi í Porsgrunn í Noregi. Tvey umboð luttóku úr Føroyum.
Ein av niðurstøðunum frá fundinum varð at gera eina felags yvirlýsing til marknaðarføring við burðardyggum uppáhaldum.

Alsamt meira umhvørvislig uppáhald og grønvasking verða nýtt, fyri at selja vørur. Tað er gott, at nógv tilvitan og virksemi er um at verja umhvørvið og veðurlagið, men tað má ikki vera villleiðandi. Brúkarar skulu hava álit á grønu uppáhaldunum. Norðurlendsku brúkaraumboðini fara tí at raðfesta eftirlitið, og taka saman tøk innan hetta økið.



## Jobmatch 2023

Fríggjadagin 29. desember 2023 var árliga Jobmatch í Norðurlandshúsinum. Brúkaraumboðið luttók saman øðrum umboðum frá Vinnustovninum. Hetta riggaði avbera væl, og vóru yvir 20 vitjandi til prát.

